samskip



# > Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

ENNEMM / SÍA / NM38535

**Starvslýsing:**
Sum formaður fært tú høvuðsábyrgd av øllum tí dagliga arbeiðinum á goymsluni. Tú kemur eisini at hava ábyrgd av, at skrásett verður í goymsluskipanini á fullgóðan hátt. Formaðurin syrgir í hesum sambandi eisini fyri, at mannagongdirnar framhaldandi vera mentar í HACCP, góðskuskipanini, til tess at tryggja, at heilsufrøðilig krøv og kundans ynskir verða gingin á møti.

**Starvskrøv:**
Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, hevur góð samstarvs- og samskipanarevnir og dugir at samskifta við umhugsni – eisini tá ið harðast leikar á. Eisini vænta vit viðkomandi telduførleika og royndir.

**Seinasta freist** at søkja er 03. juli kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi
- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar og góðar arbeiðsumstøður

**Meira kunning:**
Hevur tú spurningar til starvið, ring vinarliga til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tlf. 47 77 77 ella skriva til t-post niels.madsen@samskip.com

Løn sambært avtalu.

**Umsókn skal sendast til:**
Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

**> Fyrirtøkan**
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann største bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.

SEV

# Elektrikari ella líknandi til SEV

Á Eltøknideildini er eitt starv sum elektrikari/montørur leyst at søkja. Á deildini starvast í løtuni 1 verkfrøðingur og 4 elektrikarar.

Talan er um eitt fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum fyri bæði fakligari og persónligari menning millum annað gjøgnum skeiðsvirksemi bæði hjá SEV og uttanlands.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltøkniliga útbúnaðinum á elverkum og koblingsstøðum kring alt landið. Tú verður við til at leggja arbeiðið tilrættis, og til tíðir er arbeiðið sera sjálvstøðugt. Í tíðarskeiðum verður tað brúk fyri, at tú er fleksibul og kann arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Sum umsøkjari hevur tú fyrimun, um tú**
- er útbúgvin elektrikari, elinnleggjari ella tilsvarandi
- er áhugaður í at arbeiða við SRO- og PLC skipanum, instrumentering og kalibrering av transmittarum
- dugir at arbeiða við stýringum og lykladiagrammum
- kennir til elinnleggingar og veitingaranlegg (SB6)
- dugir at arbeiða við teldu á vanligum støði
- dugir at málbera teg í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum
- er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Høgna Hansen, leiðara á Eltøknideildini á 346800.

Er hetta nakað, ið hevur tín áhuga, skal tú senda eina umsókn við prógvum til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postsmoga 319, 110 Tórshavn, í seinasta lagi týsdagin 30. juni 2009.

Elfelagið SEV · Postsmoga 319 · 110 Tórshavn · www.sev.fo

**Vit selja m.a.**
- garaguhurðar
- slúsir
- lossibrýr
- skjóttgangandi hurðar

**Vit hava drúgvar royndir – spyr okkum um tilboð**



*Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður*
VESTARA BRYGGJA · BOKS 3135 · 110 TÓRSHAVN
TLF. 319992 · TMV@OLIVANT.FO
Crawford

HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN



**ERGOTERAPEUTUR**
**ELLA FYSIOTERAPEUTUR**
**TIL HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐINA**

KREA · TEL 60 80 80

Eitt starv sum ergoterapeutur ella fysioterapeut til Hjálpartólamiðstøðinaer leyst at seta beinanvegin.

> Meira fæst at vita um starvi á www.almannastovan.fo

**Veitst tú eina góða?**

Ring til Sosialin tlf 341800



**Til allar familjur í Føroyum !**

Komið og roynið skótalívið í fýra dagar á Selatrað, frá 2. til 5. juli

Lesið meira á: www.skoti.fo

**Sosialurin**
...altíð við tí nýggjasta

**Tekna hald NÚ**
kr. 495,-
um ársfjórðingin

Spar 560,- í mun til leysasølu

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposted. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

**Send lepan til:** Sosialurin · Boks 76 · FO-110 Tórshavn

